Fróðskaparsetur Føroya

**MANDAT FYRI STRATEGIARBEIÐIÐ FYRI FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA**

Stýrið hevur ætlanir um at gera eina heildarstrategi fyri Fróðskaparsetur Føroya. Henda strategiin skal byggja á strategiirnar hjá ymsu deildunum, og tí biður stýrið deildirnar gera sær sína egnu strategi.

Stýrið hevur samtykt hesar leiðbeinandi reglur fyri strategiarbeiðið á deildunum á Fróðskaparsetrinum:

1. Til tess at strategiin skal vera verulig og kunna fylgjast upp við ítøkiligum virksemis ætlanum, er tað umráðandi við breiðari luttøku frá starvsfólki og teimum lesandi. Tað er sera umráðandi at starvsfólk og lesandi verða partur av hesum arbeiðið.

2. Ein strategi skal gerast fyri hvørja deild sær og ein almenn strategi fyri allan stovnin, galdandi í 5 ár. Strategiin skal verða stuttorðað, einans einar 2-3 síður.

3. Stýrið viðger heildarstrategiina fyri alt Fróðskaparsetrið og orðar eina framtíðarætlan ella visión.

4. Eftir at stýrið hevur orðað visión og heildarstrategi fyri Fróðskaparsetrið, skulu deildirnar gera ítøkiligar virksemisætlanir við støði í hesum.

5. Deildirnar skulu verða lidnar við at orða strategi í viku 4/2010. Strategiin skal ítøkiliggerast við at deildinar menna virksemisætlanir, sum skulu verða liðugar á várið 2010.

6. Í arbeiðinum hjá deildunum við strategiini skal serligur dentur leggjast á at greina økini útbúgving og gransking.

7. Strategiin hjá deildunum skal umfata hesi kjarnuøki:

- Útbúgving
  - ✓ Lestrarbygnaður
  - ✓ Framtíðarmál (taláseting)
  - ✓ Vøkstur av lesandi/útbúgvingum
  - ✓ Alumnevirksemi (Samband við fyrrv. lesandi)
  - ✓ Trygging av góðsku í útbúgving og gransking
  - ✓ At lesandi taka lut á øllum økjum

- Gransking
  - ✓ Endamál við granskingini
  - ✓ Raðfesting av granskingarøkjum

- ✓ Tal á Ph.D. lesandi
- ✓ Endamál við Ph.D. útbúgvingunum
- ✓ Almannkunngerðing av greinum, bókum v.m. (taláseting)
- ✓ Miðling av gransking og vitan á annan hátt.

8. Øki, sum deildirnar skulu geva serligan ans í strategiarbeiðinum, eru m.a. dagføring av karminum fyri øllum útbúgvingunum á Setrinum, menning av tvørgangandi granskingar- og útbúgvingarsamstarvi og menning av samstarvinum við onnur universitet.

9. Deildirnar skulu orða eina strategi fyri at:

- Dagføra karmarnar fyri samanseting og skipan av útbúgvingum á bachelor- og masterstigi íroknað hjánám, soleiðis at karmarnir verða teir somu fyri allar deildir.
- Økja um møguleikarnar fyri tvørgangandi útbúgvingartilboðum.
- Skipan av lestrarvegleiðing, vegleiðing um útbúgvingarviðurskifti, skiftislesnaði og yrkismøguleikum fyri tey lesandi.
- Definera krøvini til eftir- og ískoytisútbúgvingar og koma við uppskoti til hvussu hesin parturin av virksemi Setursins skal skipast.
- Koma við uppskoti til hvussu pedagogikum fyri miðnámslærarar og seturslærarar skal skipast sum partur av undirvísingini á Setrinum.
- Leggja áherðslu á samstarv kring undirvísing og gransking við onnur universitet og linna undir altjóðagerðini av Fróðskaparsetrinum og bjóða út skeið har undirvíst verður á enskum.
- Fyrireika setrið til kravda eftirmeting av útlendskum serfrøðingum um trý ár.

10. Stýrið hevur avgjørt at ein bólkur skal setast, sum skal arbeiða við at lýsa bygnaðarligar møguleikar á Fróðskaparsetrinum. Hesin bólkurin skal serliga lýsa møguliga skipan av Setrinum og fíggjarviðurskiftunum.

Samtykt av stýrinum 14. oktober 2009